VÁGA KOMMUNA

# Gerðabók

## Býráðið

| | |
|---|---|
| **Dagfesting:** | 28.09.2021 kl. 18:00 |
| **Fundarstaður:** | |
| **Málnr.:** | 21/00003 |
| Til staðar: | Bjarni Prior, Albert Ellefsen, Dagbjørn Hansen, Rósa Samuelsen, Jónhard Selfoss, Tórdis Dam Johannesen, Ásla Leila Johansen, Sólfríð Fjallsbak, Jóanis Albert Nielsen, Herborg Gaardlykke |
| Varalimir: | |
| Ikki til staðar: | Jens Gaardlykke |
| Aðrir partar: | Anna Malena Thomassen |
| Fundarskrivari: | Jóhan Hendrik Ellefsen |


| **Málsyvirlit** | | | **Síða** |
|---|---|---|---|
| **Til støðutakan** | | | |
| 122/21 | 21/00448-4 | Umsókn um sundurbýti av matr. nr. 293a í Sandavági | 3 |
| 123/21 | 21/00449-2 | Umsókn um byggiloyvi til bilhús á matr. nr. 97b í Sandavági | 4 |
| 124/21 | 21/00532-2 | Umsókn og uppskot um nýggja útstykking á matr. nr. 260 og 86 í Miðvági | 5 |
| 125/21 | 21/00576-5 | Umsókn um byggiloyvi til sethús á matr. nr. 208k í Miðvági | 6 |
| 126/21 | 21/00600-3 | umsókn um byggiloyvi til umbygging av neystum, matr. nr. 104a og 310 í Miðvági | 7 |
| 127/21 | 21/00604-3 | Umsókn um at byggja uppí matr. nr. 120a í Miðvági | 8 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 128/21 | 21/00628-3 | Uppskot frá borgarstjóranum um at broytra byggisamtyktina fyri ein part av matr. nr. 158a í Sandavági | 9 |
| 129/21 | 21/00629-3 | Uppskot frá borgarstjóranum um at broytra byggisamtyktina fyri ein part av matr. nr. 410a í Vatnsoyrum | 10 |
| 130/21 | 19/00863-24 | Minnisstein og merki | 11 |
| 131/21 | 21/00549-4 | Umsókn um sundurbýti av matr. nr. 264a í Sandavági. Partur av gøtu fram við Stórá | 12 |
| 132/21 | 21/00550-1 | EXTRA21_02 Eykaætlan 02 2021 | 13 |
| 133/21 | 21/00595-2 | Vága Ríðingarfelag søkir um stuðul | 15 |
| 134/21 | 21/00598-3 | Fíggjarætlan fyri 2022 | 16 |
| | | | |

Formansváttan:____________

VÁGA KOMMUNA

**Til støðutakan**

## 122/21 Umsókn um sundurbýti av matr. nr. 293a í Sandavági

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 20.09.2021 | 89/21 |
| 2 Býráðið | 28.09.2021 | 122/21 |

### Málslýsing:

Eigarnir av matr. nr. 293a í Sandavági søkja um at býta sundur matrikulin. Talan er um eitt stykki á 436m$^2$ í Miðhjallar í Sandavági. Ætlanin er at selja matrikulin sum grundstykki til sethúsabygging.

Umhvørvisstovan hevur sent kommununi umsóknina til ummælis.

**Viðmerking frá umsitingini:**
Sambært byggisamtyktini liggur matrikulin í B-øki (sethúsaøki). Tað er ein partur av gamlari útstykkingarætlan, og sambært galdandi byggisamtyktini §13, stk. 2, stendur:

> *Grundstykkini skulu vera í minsta lagi 500 kvm. til støddar. Tá ið byggingin verður framd eftir byggiskipan, ið byggivaldið hevur góðkent og tryggjað, ella eftir serstakari byggisamtykt, kann byggivaldið loyva, at grundstykkini eru minni enn 500 kvm., tó í minsta lagi 400 kvm. fyri sethús (einhúskishús) og 300 kvm. fyri hvønn partin av einum tvíhúsum, ketu- ella raðhúsum. Ein partur av tí ásettu minstuvíddini kann verða lagdur burturav sum felags tilhalds- og bilstøðlaøki.*

### Tekniska nevnd 20. september 2021:

Viðmælt.

### Býráðið 28. september 2021:

Viðmælt.

Formansváttan:____________

VÁGA KOMMUNA

# 123/21 Umsókn um byggiloyvi til bilhús á matr. nr. 97b í Sandavági

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 20.09.2021 | 90/21 |
| 2 Býráðið | 28.09.2021 | 123/21 |

## Málslýsing:

Eigarin av matr. nr. 97b í Sandavági søkir um byggiloyvi til bilgoymslu.

Bilgoymslan er $70m^2$, við einum hjalli á $3m^2$. Matrikulin er $1123m^2$.

Sambært byggisamtyktini §26, stk. 5, stendur:

> *Bilhús, og onnur úthús í sjálvstøðugum bygningum á grundstykkinum, skulu í mestalagi verða, 50 $m^2$ herav bilhúsið kann verða 35 $m^2$, og verða ikki roknað uppí nýtingarstigi. Hæddin á bilhúsinum og onnur úthús á grundstykkinum, skal verða í mestalagi 2,50 m til sill við 30° reising.*

## Tekniska nevnd 20. september 2021:

Frámælt orsakað av at byggisamtyktin ikki loyvir samb. § 26 stk. 5

## Býráðið 28. september 2021:

Samtykt at taka málið av skrá.

Formansváttan:__________

# 124/21 Umsókn og uppskot um nýggja útstykking á matr. nr. 260 og 86 í Miðvági

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 20.09.2021 | 91/21 |
| 2 Býráðið | 28.09.2021 | 124/21 |

**Málslýsing:**

Eigararnir av matr. nr. 260 og 86 í Miðvági leggja fram uppskot, og søkja um loyvi at gera útstykking á matriklunum.

Matr. nr. 86 liggur í byggisamtyktini í øki K2-Innangarðs, og matr. nr. 260 liggur nærum allur í byggisamtyktini í K2-Innangarðs, men ein geiri móti eystasta markinum liggur í øki B-Byggiøki/sethús.

Í ætlanini er roknað við at binda vegin til útstykkingina í Dagmarsgøtu.

Um loyvi verður givið til ætlanina, verður neyðugt at broyta byggisamtyktina, og má byggivaldið takað støðu til, um tað metur tað verða skilagott at byggja sethús longur vestur móti Leitisvatni.

**Tekniska nevnd 20. september 2021:**

Frámælt.

**Býráðið 28. september 2021:**

Samtykt ikki at geva loyvi til ætlanina.

Formansváttan:____________

# 125/21 Umsókn um byggiloyvi til sethús á matr. nr. 208k í Miðvági

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 20.09.2021 | 92/21 |
| 2 Býráðið | 28.09.2021 | 125/21 |

**Málslýsing:**

Eigarnir av matr. nr. 208k í Miðvági søkja um byggiloyvi til sethús.

Matrikulin er trupul at byggja á, men hava tey tikið atlit til grannarnar.
Á matr. nr. 208k í Miðvági er tinglýst ávís frástøða til mark; 5 metrar móti norð og vest, og 3 metrar móti eystur og suður. Í tveimum støðum eru húsini nærri markinum enn loyvt, og søkja tey tí um frávik. Talan er um lítlan part, ið stingur 20-30 cm útum móti norð-eystursíðuni.

**Viðmerkingar frá umsitingini:**

Byggivaldið má takað støðu til um frávik kann gevast.

**Tekniska nevnd 20. september 2021:**

Viðmælt at geva byggiloyvi

**Býráðið 28. september 2021:**

Samtykt at taka undir við teknisku nevnd.

Formansváttan:____________

VÁGA KOMMUNA

# 126/21 umsókn um byggiloyvi til umbygging av neystum, matr. nr. 104a og 310 í Miðvági

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 20.09.2021 | 94/21 |
| 2 Býráðið | 28.09.2021 | 126/21 |

## Málslýsing:

Eigarnir av neystunum á matr. nr. 104a og 310 í Miðvági, søkja um byggiloyvi at umbyggja neystini.

Ætlanin er at hækka gólvið og byggja eina reising, soleiðis at bæði neystini verða størri og meiri brúkilig.

## Viðmerking frá umsitingini:

Ætlanin er at norðursíðan fluktar við grannaneystini, har er støðan tann at norðasti parturin av neystinum er á grund hjá kommununi, og tí skal takast avgerð um kommunan vil leiga teimum øki.

Byggiloyvi kann gevast við tí treyt, at neyðugar tekningar eru tøkar og viðurskifti eru komin uppá pláss.

## Tekniska nevnd 20. september 2021:

Viðmælt.

## Býráðið 28. september 2021:

Samtykt at taka undir við teknisku nevnd.

Formansváttan:____________

VÁGA KOMMUNA

## 127/21 Umsókn um at byggja uppí matr. nr. 120a í Miðvági

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 20.09.2021 | 95/21 |
| 2 Býráðið | 28.09.2021 | 127/21 |

**Málslýsing:**

Eigarnir av matr. nr. 120a í Miðvági, søkja um loyvi at byggja uppí fjósið við Nýggjaveg.

Talan er um at byggja hjall og flettingarrúm uppí verandi fjós, ið tey eru í fer við at seta í stand. Tilbyggingin er 5m langt og breiddin av verandi bygningi.

Matrikulin liggur í H-øki: Frílendi, og eru ásetingarnar hesar:

*1. Frílendi t.e. bøur og lendi, ið ikki má byggjast á. Lutvíst eru tað lendi, ið løgd eru av til varðveitingar av náttúru, fornminnum o.t. og til at fríðka um bygdina og gera hana dámligari at búgva í.*
*2. Á teim í 1. stk. nevndu økjum mugu bert verða gjørdir vegir, gøtur, bilstøðlar, veitingar, garðar o.t. Á teimum einstøku økjunum kunnu verða reistir bygningar, ið skila til virðið á økinum.*
*3. Útstykking má ikki fara fram.*

**Tekniska nevnd 20. september 2021:**

Viðmælt.

**Býráðið 28. september 2021:**

Herborg Gaardlykke luttók ikki í viðgerðini av málinum.

Samtykt at taka undir við teknisku nevnd.

Formansváttan:__________

## 128/21 Uppskot frá borgarstjóranum um at broyta byggisamtyktina fyri ein part av matr. nr. 158a í Sandavági

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 20.09.2021 | 96/21 |
| 2 Býráðið | 28.09.2021 | 128/21 |

**Málslýsing:**

Borgarstjórin leggur uppskot fyri býráðið um at broyta byggisamtyktina, fyri ein part av matr. nr. 158a í Sandavági.

Matrikulin er sunnanfyri øki, sum kommunan ætlar at gera eina útstykking á, og er ætlanin við broytingini at hava møguleika at útstykkja longur suður, um tørvur verður á tí.

**Tekniska nevnd 20. september 2021:**

Viðmælt.

**Býráðið 28. september 2021:**

Samtykt at taka undir við teknisku nevnd.

Formansváttan:

VÁGA KOMMUNA

# 129/21 Uppskot frá borgarstjóranum um at broyta byggisamtyktina fyri ein part av matr. nr. 410a í Vatnsoyrum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 20.09.2021 | 97/21 |
| 2 Býráðið | 28.09.2021 | 129/21 |

**Málslýsing:**

Borgarstjórin leggur uppskot fyri býráðið um at broyta byggisamtyktina, fyri ein part av matr. nr. 410a í Vatnsoyrum.

Matrikulin liggur í øki, sum kommunan ætlar at gera eina lítla útstykking á, og er ætlanin við broytingini, at hava møguleika at útstykkja longur norður enn galdandi byggisamtykt loyvir.

**Tekniska nevnd 20. september 2021:**

Viðmælt.

**Býráðið 28. september 2021:**

Samtykt at taka undir við teknisku nevnd.

Formansváttan:_____________

VÁGA KOMMUNA

## 130/21 Minnisstein og merki

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentunar- og trivnaðarnevndin | 13.09.2021 | 73/21 |
| 2 Fíggjarnevndin | 23.09.2021 | 85/21 |
| 3 Býráðið | 28.09.2021 | 130/21 |

**Málslýsing:**

Í samband við 100 ára haldið fyri búsetingina í Vatnsoyrum, er ynski um at ein steinur við einum minnismerki verður sett upp við Miðstaðarøkið. Kostnaðurin fyri framleiðslu og uppsetan er kr. 25.000,-.

**Mentunar- og trivnaðarnevndin 13. september 2021:**

Mælt verður til at fylgja ætlanini sum er gjørd fyri miðstaðarøkið.

**Fíggjarnevndin 23. september 2021:**

Meiriluti mælir til at fylgja tilmælinum hjá Mentunar- og trivnaðarnevndini.
Minniluti mælir frá og vil hava málið avgreitt á býráðsfundi.

**Býráðið 28. september 2021:**

Samtykt at keypa steinin við minnismerki fyri kr. 25.000,-

Formansváttan:__________

VÁGA KOMMUNA

## 131/21 Umsókn um sundurbýti av matr. nr. 264a í Sandavági. Partur av gøtu fram við Stórá

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 20.09.2021 | 98/21 |
| 2 Fíggjarnevndin | 23.09.2021 | 88/21 |
| 3 Býráðið | 28.09.2021 | 131/21 |

**Málslýsing:**

Vága kommuna hevur heitt á eigararnar av matr. nr. 264a í Sandavági, at selja burtur av matrikulinum har byrjanin til almennu gøtuna fram við Stórá er.

Eigararnir hava samtykt at selja partin á 486 m$^2$ av matr. fram við Stórá. Tí verður søgt um sundurbýti av matr. nr. 264a í Sandavági.

Umhvørvisstovan hevur sent kommununi umsóknina til ummælis.

**Tekniska nevnd 20. september 2021:**

Viðmælt.

**Fíggjarnevndin 23. september 2021:**

Viðmælt.

**Býráðið 28. september 2021:**

Viðmælt.

Formansváttan:__________

VÁGA KOMMUNA

## 132/21 EXTRA21 02 Eykaætlan 02 2021

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 26.08.2021 | 79/21 |
| 2 Býráðið | 31.08.2021 | 121/21 |
| 3 Fíggjarnevndin | 23.09.2021 | 83/21 |
| 4 Býráðið | 28.09.2021 | 132/21 |

**Málslýsing:**

**1. viðgerð av eykaætlan 02 2021**

| | | |
|---|---|---|
| § 1. | Kommunal fyrisiting | kr. 1.450.000,- |
| § 2. | Almanna- og heilsumál | kr. 100.000,- |
| § 3. | Børn og ung | kr. 150.000,- |
| § 4. | Undirvísing - rakstur | kr. 157.000,- |
| § 4. | Undirvísing - løga | kr.-1.784.500,- |
| § 5. | Mentan & frítíð | kr. 250.000,- |
| § 6. | Teknisk mál rakstur – meir avseting | kr. 677.500,- |
| § 6. | Teknisk mál rakstur – minni avseting | kr.-1.000.000,- |

**Viðmerkingar:**

§ 1. Meiravseting til lønir, umboðan og keyp av tænastum.
§ 2. Meiravseting til frípláss.
§ 3. Meiravseting til systkinafrádrátt.
§ 4. Meiravseting til svimjing (Kvívík) og til skúlabarnaflutning.
§ 4. Minni avseting til skúlabygging.
§ 5. Meiravseting til stuðul til mentan (Seyðamaðurin á Sondum)
§ 6. Meiravseting til viðlíkahald av bygningningum.
§ 6. Minni avseting til vegir

**Fíggjarnevndin 26. august 2021:**

Viðmælt.

Formansváttan:____________

VÁGA KOMMUNA

**Býráðið 31. august 2021:**

Samtykt

**2. viðgerð av eykaætlan 02 2021**

Broytingar síðan 1. viðgerð:

§ 1.Kommunal fyrisiting hækkar við kr. 214.500,- til kr. 1.664.500,-

**Viðmerkingar:**

Meiravseting til umboðan.

.

**Fíggjarnevndin 23. september 2021:**

Viðmælt.

**Býráðið 28. september 2021:**

Samtykt at taka undir við fíggjarnevndini.

Formansváttan:____________

VÁGA KOMMUNA

## 133/21 Vága Ríðingarfelag søkir um stuðul

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentunar- og trivnaðarnevndin | 13.09.2021 | 59/21 |
| 2 Fíggjarnevndin | 23.09.2021 | 96/21 |
| 3 Býráðið | 28.09.2021 | 133/21 |

**Málslýsing:**

Vága ríðingarfelag søkir um fíggjarligan stuðul at gera ríðihøllina úti á Dal lidna.

**Mentunar- og trivnaðarnevndin 13. september 2021:**

Viðmælt at játta kr. 75.000,- til Vága ríðingarfelag fyri 2021.

**Fíggjarnevndin 23. september 2021:**

Mælt verður til at taka undir við Mentunar- og trivnaðarnevndini.

**Býráðið 28. september 2021:**

Samtykt at taka undir við fíggjarnevndini.

Formansváttan:____________

VÁGA KOMMUNA

## 134/21 Fíggjarætlan fyri 2022

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 23.09.2021 | 84/21 |
| 2 Býráðið | 28.09.2021 | 134/21 |

**Málslýsing:**
Fíggjarnevndin skal fyri 1. oktober leggja fram uppskot til fíggjarætlan fyri kommunustýrið. Kommunustýrið skal viðgera uppskot til fíggjarætlan tvær ferðir við í minsta lagi 14 daga millumbili. Fíggjarætlanin skal vera endaliga samtykt í seinasta lagi 1. desember 2021

**Viðmerkingar hjá umsitingini**

**Rakstur**
Stovnsleiðarar, sum vara av § 3. «Børn og ung» og §4 «Undirvísing» hava verið til samráð við umsitingina um fíggjarætlanirnar.
Tølini fyri tekniska økið eru metingar og skulu viðgerðast millum 1. og 2. viðgerð.
Felagsmál við Sørvágs kommunu og fíggjarætlanin fyri Heimatænastuna skulu viðgerðast nærri millum 1 og 2 viðgerð

**Løgur**
Umsitingin hevur mett um nakrar avsetingar til løgur, hesar skulu viðgerðast nærri millum 1. og 2. viðgerð.

**Inntøkur**
Skattaprosenti er sett til 22% og skattskylduga inntøkumetingin hjá TAKS er partvís brúkt sum grundarlag. Barnafrádrátturin er kr. 5.500,-
Skattur av eftirlønargjøldum og flytingar fyri DIS, NIS og FAS eru metingar hjá TAKS.

| | |
|---|---|
| Rakstrarútreiðslur | 92.497.652 |
| Løguútreiðslur | 10.900.000 |
| Inntøkur | 106.980.000 |
| **RLÚ** | **3.582.348** |

**Fíggjarnevndin 23. september 2021:**

Viðmælt.

**Býráðið 28. september 2021:**

Samtykt.

Formansváttan:__________

VÁGA KOMMUNA

Fundurin lokin kl. 19:04

Bjarni Prior

Albert Ellefsen

Dagbjørn Hansen

Rósa Samuelsen

Jónhard Selfoss

Tórdis Dam Johannesen

Ásla Leila Johansen

Sólfríð Fjallsbak

Jóanis Albert Nielsen

Herborg Gaardlykke

Formansváttan:__________